


FT Online er nýggj deild á Føroya Tele, ið umsitur og mennir onlinetænastur felagsins, umframt útgávuna av Telefonbókini. Onlinetænasturnar, ið talan er um, eru portal.fo, sportal.fo, planet.fo, nummar.fo og gulu.fo.

Vit kunna bjóða einum komandi starvsfelaga góðar møguleikar fyri fakligari og persónligari menning, umframt góðar og nýmótans arbeiðsumstøður.

**Arbeiðsinnihald**
Arbeiðið fevnir um at samskipa partar av KT-menningini hjá FT online. Samskiparin skal m.a. standa fyri kravfestingum og prosjektleiðslu í mun til menning av nýggjum tænastum á onlineøkinum, eins og viðkomandi kemur at standa fyri samskifti við uttanhýsis KT-veitarar og við innanhýsis KT-umhvørvið á Føroya Tele.

Vit ímynda okkum, at tann, ið fær starvið, hevur royndir á hesum økjum:

- Prosjektleiðslu av KT-verkætlanum
- Ger av kravfestingum, analysu og designi á KT-økinum
- PHP, MySQL umframt onnur forritanarmál og aðra databasutøkni
- Viðkomandi útbúgving ella drúgvar royndir á økinum

Vit rokna eisini við, at rætti umsøkjarin hevur:
- Hugsjónir um internetið
- Góðan kunnleika til føroyskt og enskt
- Nærlagt og sjálvstøðugt arbeiðslag
- Jaligt sinni og góð samskiftisevni

**Umsóknir**
Umsóknir við avritum av CV og viðkomandi skjølum skulu vera starvsfólkadeildini í hendi í seinasta lagi 4. mai 2009 og skulu sendast til:

Føroya Tele
Starvsfólkadeildin
Postrúm 27
110 Tórshavn

ella til:
starvsfolkadeildin@ft.fo

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Óla á Deild Olsen á tel. 243011 ella á odo@ft.fo. Eisini ber til at venda sær til starvsfólkadeildina á tel. 303030.

Føroya Tele er fremsta KST-fyritøka í Føroyum. Felagið er eitt samtak av einum móðurfelag og trimum dótturfeløgum. FT Online er partur av móðurfelagnum.

FØROYA TELE

SENDISTOVAN




FT Samskifti mennir, marknaðarførir og selur tænastur, sum Føroya Tele veitir fyritøkum og einstaklingum. Á Rakstrardeplinum arbeiða 27 starvsfólk, og depilin hevur ábyrgd av at menna og reka tøkniligu útgerðina.

Vit kunnu bjóða einum komandi starvsfelaga góðar møguleikar fyri fakligari og persónligari menning, umframt góðar og nýmótans arbeiðsumstøður.

**Arbeiðsinnihald**
Arbeiðið fevnir um umsiting av nýggja hýsingarumhvørvinum á Føroya Tele, so sum VMware, VPN-loysnir, Cisco og ymiskar servaraloysnir.

Arbeiðið fevnir eisini um at menna verandi internettænastur, herundir:
- ráðgeving til viðskiftafólk
- menning av nýggjum hýsingar- og internettænastum
- rakstur av highend ciscoútgerð
- forritan av serútgerð

Vit ímynda okkum, at tann, ið fær starvið, hevur:
- royndir í framkomnum hýsingar- og vevloysnum
- hugsjónir um internetið
- góðan kunnleika í enskum
- nærlagni og sjálvstøðugt arbeiðslag
- jaligt sinni og góð samskiftisevni
- viðkomandi tøkniútbúgving ella drúgvar royndir á økinum

Fyrimunur er at hava førleikar og royndir innan:
- VMware ESX
- Ciscoútgerð, herundur VLAN
- Windowsskipanir sum Exchange og MOM
- IIS/Apache vevservarar
- TCP/IP og internet
- Linux

**Umsóknir**
Umsóknir við avritum av CV og viðkomandi skjølum skulu vera starvsfólkadeildini í hendi í seinasta lagi mánadagin 27. apríl 2009 og skulu sendast til:

Føroya Tele
Starvsfólkadeildin
Postrúm 27
110 Tórshavn

ella til:
starvsfolkadeildin@ft.fo

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Páll Wiberg Joensen á tel. 243521 ella á pwj@ft.fo. Eisini ber til at venda sær til starvsfólkadeildina á tel. 303030.

FT Samskifti er dótturfelag í Føroya Tele. Í felagnum er øll kundarøkt, øll søla og alt samskifti við privatkundar og vinnukundar, alt GSM-samskifti og øll staðarútgerð til fastnettelefoni og breiðband. Í felagnum starvast gott hundrað fólk. Tænastur frá FT Samskifti verða marknaðarførdar undir navninum Føroya Tele.

FØROYA TELE

SENDISTOVAN